## Nevndin í Smyril Line mannað

Á eykaaðalfundi í partafelagnum Smyril Line í gjár fekk felagið nýggja nevnd. Nevndin í Smyril Line hevur fimm limir, og av teimum eru tvær kvinnur. Formaður í nevndini er danski vinnulívsmaðurin Klaus Kjærulff, sum landsstýrið hevur valt í nevndina. Hinir nevndarlimirnir eru Jens Meinhard Rasmussen, Susan K. Gregoriussen, Hendrik Egholm og Linda Gunnlaugsdóttir. Hon hevur fyrr verið stjóri hjá Eimskipum í Føroyum.



*Nýggi nevndarformaðurin Klaus Kjærulff*

## 123.fo fíggjarliga innspræning

Heimasíðan 123.fo hevur fingið peninga innspræning, sum Skráseting Føroya hevur skrásett. Upprunaligi partapeningurin er lækkaður úr 330.000 krónum niður á 0 til at rinda hall við, meðan nýggjur partapeningur á 450.000 krónur er goldin inn í felagið. Goldið er kontant til kurs 100. Samstundis er komin í nevndina í felagnum, sum er heimahoyrandi í Fuglafirði, Wilmar Højgaard í Rituvík. Hinir nevndarlimirnir eru Rúna Sivertsen, Streymnes, Kristian Bill Justinussen, Glyvrar, og Edmund Joensen, Lambi.

# Nógvur upsi landaður í Saltangará

**Síðan sunnukvøldið hava fýra ísfiskatrolarar landað meira enn 800.000 pund í Saltangará**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Sunnkvøldið og mánadagin var nógv landing í Saltangará, og væntandi koma tveir ísfiskatrolarar inn at landa aftur fríggjadagin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Síðan sunnukvøldið er nógvur upsi landaður í Saltangará, og landararnir á landingarmiðstøðini hjá Beta hava havt heilt fitt at gera.

Partrolararnir Bakur og Stelkur landaðu nevniliga sunnukvøldið. Teir høvdu umleið 380.000 pund av upsa, sum teir høvdu fingið eystanfyri. Slagið var gott, og á landingarmiðstøðini siga tey, at skipini fingu væl av upsa eystanfyri stutt fyri vikuskiftið.

- Seinni minkaði fiskiskapurin nakað aftur, verður lagt aftrat.

Mánadagin landaðu Rókur og Lerkur. Teir høvdu eisini ein góðan túr, 440.000 pund tilsamans, sum teir eisini høvdu fingið eystanfyri.

Á landingarmiðstøðini siga tey, at onnur skip hava eisini hava landað í Saltangará í undanfarnu viku. Eitt nú hava skip úr Havn og Vágum eisini lagt veiðina upp í Saltangará.

### Klassingar

Leirvíkstrolararnir Polarhav og Stjørnan, sum eisini plaga at leggja veiðina upp í Saltangará, eru í løtuni til klassingar. Skipini hava gjørt nakrar upsatúrar, síðan teir góvust á gulllaksaveiði seint í heyst.

Nú er ikki væntandi, at skipini loysa aftur fyri jólahøgtíðina, sum stundar til.

Á landingarmiðstøðini vænta tey, at nýggjasta parið hjá Beta, Heykur og Falkur, koma inn at landa fríggjadagin komandi.

- Skipini høvdu stívliga 500 kassar í morgun, sum er eini 300.000 pund, siga tey í Saltangará.

# 154.000 tons av toski landað í Noregi

**Útróðrarbátar, sum eru millum 11 og 15 metrar langir, hava landað sløk 29.000 tons, sum er meira enn tað tvífalda av allari toskaveiðini undir Føroyum í 2008**

NOREG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sambært hagtølum hava norsk fiskifør higartil í ár landað tilsamans 154.000 tons av toski.

Í bólkinum fyri skip og bátar, sum eru minni enn 28 metrar til longdar, eru tað serliga bátar millum 11 og 15 metrar, ið hava landað tær størstu nøgdirnar. Hesir hava nevniliga landað 29.593 tons av toski tilsamans í ár.

Hetta merkir, um vit siga tað við øðrum orðum, at norski útróðrarflotin longu higartil í ár hevur fiskað meira enn tvífalt so nógv av toski, sum øll toskaveiðan undir Føroyum var í 2007.

Trolaraflotin, sum er størri enn 21 metrar, hevur landað tilsamans 40.702 tons av toski higartil í ár.

Taka vit øll tølini yvir toskalandingar í Noregi higartil í ár og leggja tey saman, er talan um eina samlaða nøgd, sum svarar til 154.000 tons.

Tað er Fiskeribladet-Fiskaren, sum ber hesi tíðindi á síni heimasíðu.



*Toskaveiðan undir Føroyum, sum í løtuni er á søguliga lágum støði, kann ikki samanberast við norsku toskaveiðina, ið er fleiri ferðir so stór*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*